# u nú betri enn nakrantíð áður



*Atlantic Navigator er 96,2 metrar langur og 18,50 metrar breiður. Næraberg var 94 metrar langur og 13,40 metrar breiður*

Mynd: Jens Kr. Vang

- Eg vænti, at tað eru eini tíggju fólk umborð á nýggja skipinum, sum ikki hava verið við okkum áður, leggur hann aftrat.

Eingin kvinna er yvirmaður, men ein av teimum, sum starvast á labratoriunum og kannar framleiðsluna, er kvinna.

Umborð á Atlantic Navigator hendan mánamorgunin var eisini umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, og hon læt okkum vita, at stovnurin hevur góðkent skipið sum matvøruframleiðara.

Flestu yvirmenn umborð á skipinum eru føroyingar, og tað er heldur ikki so undarligt, tá ið skipið nú er heimahoyrandi í Klaksvík!

Føroyingarnir, sum hava siglt við Nærabergi, lata væl at útlendsku arbeiðsmegini, sum bæði er fryntlig og arbeiðssom.

## Surimi

Sum kunnugt, er høvuðsframleiðslan umborð á Atlantic Navigator – eins hon var umborð á Nærabergi – surimi úr svartkjafti. Hjáframleiðslan er mjøl, men tað er ein nøgv minni partur. Tað einasta, sum fer í havið aftur av fiskinum, er fiskaskræðan, men arbeitt verður við at fáa ein avtakara til skræðuna.

Umborð á Næraberg hava teir eisini gjørt onkrar royndir við at selja ein minni part av framleiðsluni sum flak, men hetta hevur higartil bert verið í smáum nøgdum.

Brandur væntaði, at Atlantic Navigator hendan fyrsta royndartúrin fer eystur ímóti norska markinum at royna teir fyrstu dagarnar. Har hava føroysku skipini, sum eru á leiðini, fingið nakað av svartkjafti.

Nýggja skipið er tveir metrar longri og fimm metrar breiðari enn hitt gamla.

- Ein høvuðsmunur er, at meðan Næraberg bert hevði eitt framleiðsludekk, hevur hetta skipið eitt framleiðsludekk aftrat. Nú hava vit 16 VMK-skerimaskinur ímóti 12 umborð á Nærabergi. Haraftrat er surimiverksmiðjan nøgv størri.

Á ovara dekkinum verður fiskurin skorin og virkaður til surimi, og á niðara dekkinum verður hann pakkaður og frystur.

Umborð á Nærabergi fóru blokkarnir leysir niður í lastina. Hetta hevði við sær nøgva handfaring. Nú fara blokkarnir niður á platti í elevatori, og niðri í lastini tekur truckur ímóti teimum og setir plattarnar upp á pláss.

- Ein fyrimunur við hesum er eisini, at nú kanst tú finna plattarnar aftur, um okkurt er at seta fingurin á í framleiðsluni, sigur Brandur og vísir á, at henda skipan eisini ger tað nógv skjótari at tøma lastina, tá ið veiðan verður løgd upp.

## Fløskuhálsar

Umborð á Nærabergi vóru fløskuhálsar, sum ikki eru umborð á Atlantic Navigator.

Skiparin sigur, at tá ið slagið var gott, kundu teir ikki koyra við øllum maskinunum umborð á gamla skipinum, tí ógjørligt var at arbeiða fiskin undan.

- Vit høvdu 7 frystarar, og nú hava vit 14.

Hann vísir á, at nógv vatn verður brúkt í framleiðsluni, men vatngerarin umborð á Nærabergi kundi bert framleiða 450 tons av feskvatni um døgnið. Nú kunnu vit framleiða 1000 tons av feskvatni um døgnið.

- Við teimum 12 skerimaskinunum kundu vit framleiða eini 82 tons av surimi um døgnið, men tá ið vit høvdu framleitt í eini tvey samdøgur, høvdu vit einki vatn eftir. Nú hava vit nóg mikið av vatni og kunnu við teimum 16 maskinunum virka eini 120 tons av surimi um døgnið.

Mjølverksmiðan umborð á Atlantic Navigator er eisini nógv størri enn umborð á gamla skipinum.

- Áður kundu vit framleiða eini 20 tons av mjøli um samdøgnið; nú kunnu vit framleiða 60 tons, sigur Brandur.

## Betri rakstur

Brandur og Lion hava báðir góðar vónir um, at raksturin hjá Atlantic Navigator verður betur, enn hann var við gamla skipinum.

- Næraberg hevur fiskað fyri góðar 100 miljónir krónur í góðar níggju mánaðir í ár, og prísurin var vánaligur.

Brandur vísir á, at prísurin á surimi hevur ikki verið góður, men hann hevur verið støðugur og spakuliga uppeftir gangandi, sum hann tekur til.

- Vit hava fingið einar 10-11 krónur fyri kilo, men var prísurin kanska 14-15 krónur fyri kilo, hevði úrslitið verið eitt heilt annað.

Bæði Brandur og Lion eru rættiliga spentir, nú lagt verður út á hav aftur við hesum stóra og stásiliga skipi.

- Vit ganga ímóti bestu svartkjaftavertíð, og tí vóna vit, at alt fer at rigga væl, tá ið vit koma út í byrjanina av komandi ári. Tað er týdningarmikið, at vit fáa eina góða byrjan við hesum skipi, siga teir. Atlantic Navigator lastar 1650 tons av surimi, meðan Næraberg bert lastaði 800 tons. Nýggja skipið lastar eisini 600 tons av mjøli ímóti 318 tons, sum hin lastaði.

- Nú kunnu vit fáa meira burtur úr upp á lutfalsliga stutta tíð, tá ið góður fiskiskapur er, og fiskurin er góður. Hetta gevur skipinum betri møguleikar, siga teir báðir.

Nýggja skipið hevur eisini munandi størri tóvmegi, enn gamla skipið hevði.

## Sum nýggjur

Atlantic Navigator hevur sína søgu, sum vit ikki fara at endurtaka her.

- Skipið er lutfalsliga nýtt og hevur verið lítið í vinnu. Tað er væl hildið og er í góðum standi.

Brandur Nólsoy heldur, at hevur skipið verið í vinnu í eini 2-3 ár tilsamans, er tað alt.

Atlantic Navigator er 96,2 metrar langur og 18,50 metrar breiður. Næraberg var 94 metrar langur og 13,40 metrar breiður.



*Umborð á Atlantic Navigator eru 16 VMK-skerimaskinur*

Mynd: Jens Kristian Vang